# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Útbúgvingar-umstøður í focus

Tað er eitt sera áhugavert evni, sum MFS nú hevur sett á dagsskrá á fundi í Miðlahúsinum í kvøld, umstøðurnar hjá hægi útbúgvingunum í Føroyum og hjá teimum lesandi við Fróðskaparsetur Føroya, sum er okkara hægsti lærustovnur. Altjóðagerðin hevur meira enn nakað annað, sett hægri útbúgving og gransking í brennidepilin. Um allan heim kýta stjórnir og myndugleikar seg fyri at tryggja útbúgving og gransking tey best hugsandi kor. Hetta verður gjørt, tí tey ráðandi vita, at tey lond, ið hava bestu útbúgvingartilboð og fremstu granskingarførleikarnar gerast vinnararnir í tí beinhørðu kappingarstøðu, sum altjóðagerðin hevur skapað.

Hvussu er so vorið hjá okkum? Hvussu eru vit brynjað í hesar altjóða kappingarstøðu? Hvussu hava føroyskir myndugleikar handfarið alt hetta økið. Taka vit tey yvirskipaðu viðuskiftini, so tykist væl standa til, og vælvildin tykist markleys. Løgmaður og landsstýrið hava kunngjørt Visjon 2025. Her verður sligið fast, at "Týdningarmesta tilfeingi er eitt vælútbúgvið fólk". Hetta kann bert merkja, at um átta ár er tað ikki vøruframleiðsla men vitanarfamleiðsla, sum skal verða berandi í føroyskum búskapi og sum skal tryggja vælferð og menning. Um gransking og nýskapan verður sagt, at Føroyar skulu verða millum fremstu lond og ítøkiliga er ætlanin at samskipa hægri útbúgvingarnar í ein lærdóms- og grankinagrmiðdepil. Hetta er alt samalt sera gott og eingin kann vera ósamdur!

Hvussu er støðan hjá okkara mætasta lærdómssetri og teimum ungu, ið hava valt at taka eian hægri útbúgving í Føroyum. Støðan er alt annað enn góð. Landsins myndugleikar tey seinastu mongu árini hava ikki raðfest lestarumstøðurnar hjá okkara heimligu studentum. Henda ábreiðsla er galdandi fyri øll landsstýri og allar flokkar. Skulu tey lesandi fáa sum mest burturúr, krevur hetta eitt minstamál av einum lestrarumhvørvi. Eftir hvat, ið frættist eru munandi batar í hølisviðurskiftunum á veg, og ávísar deildir fáa nógv meira rúm og góð nútímans høli. Tað er bert at fegnast um, og mentamálaráðharrin eigur rós uppiborið fyri hetta stig, sum merkir fyrsta veruliga bata av hølisumstøðunum í nógv ár.

Men eitt samlað lestraumhvørvi verður neyvan skipað í bræði. Innihaldsliga og skipanarliga tykjast myndugleikarnir at vera avkláraðir við ætlanum um samanleggingar og bygnaðarbroytingar. Hetta er gott og neyðugt. Men høliskarmarnir mugu vera í lagi. Góð høli á einum og sama stað eru ein fortreyt fyri góðum úrsliti. Tíðin er nú komin, at myndugleikarnir mugu koma við eini ætlan um loysn á húsaspurningin hjá okkara universiteti. Latið okkum fáa ein universitetscampus! Latið orð og gerðir samsvara!Hetta mál kann ikki bíða longur, um Føroyar skulu varðveita og menna eitt fruktbart universitetsumhvørvi, ið kann geva sítt íkast til samfelagið bæði so og so. Hetta kann ikki bíða, um vit skulu verða millum fremstu tjóðir í 2015.

**Sosialurin**

# Yvirtøka uttan politiska viðgerð

JOHAN DAHL
løgtingsmaður



**Letur løgmaður nú landsstýrismannin í Vinnumálum undirskrivað avtalu um yvirtøku av loftrúminum uttan politiska viðger og semju ??**

Bjarni Djurholm heldur seg hvørki til vanligar politiskar mannagongdir og als ikki til samgonguskjalið um hann ætlar at gera avtalu um yvirtøku av loftrúminum.

Á heimasíðu fólkafloksins í samband við yvirtøkuna av vinnulóggávuni verður m.a. eisini sagt fylgjandi:

"Danski landsstýrismaðurin Flemming Hansen og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum fara væntandi í septembur 2007 at **undirskriva sáttmála um yvirtøku á loftrúminum á føroyskar hendur**. Nær endaliga yvirtikan verður framd er tó ikki avtalað enn. Men ætlanin er at tað skal vera um somu tí sum vinnulóggávan".

Eitt er hvat fólkaflokkurin og vinnumálaráðharrin helst vilja hava fram, annað er hvat er politiskt avtalað og parturin um loftrúmið er ikki avtalað at yvirtakað í hesum samgonguskeiðinum.

Sigast skal at meirilutin í uttanlandsnevndin (Johan Dahl, Jógvan við Keldu, Anfinn Kallsberg, John Johannessen, Kristian Magnussen, Jenis av Rana), hava í samband við ráførslu um **føroyskan limaskap í ECAA** tikið undir við, at løgmaður tekur upp samráðingar um at fáa sett ECAA sáttmálan í gildi fyri Føroyar, sum mælt verður til í skrivi løgmans.

**Samstundis verður heitt á løgmann um at kanna og greina:**

• Verandi sáttmála millum Danmark og Ísland um flúgving í føroyskum loftrúmi og møguleikan hjá føroyskum myndugleikum at yvirtaka hesa uppgávu

• Fyrimunir og vansar við, at málsøkið "Loftferðsla" verður yvirtikið av føroyskum myndugleikum, herundir eisini, hvør rættarstøðan tá verður í mun til ECAA, og rættarstøðuna innan málsøkið í mun til danskar og ES-myndugleikar

Omanfyri útgreinaða vinnumálaráðið við at fáa kannað og útgreinað - arða uppgávu hevur ráðið hjá Bjarna Djurholm ikki fingið heimild til frá løgmanni, skilji tí ikki nýggjheitina á heimasíðu folkafloksins.

Yvirtøka av loftrúminum er ikki við í nakrari samgonguavtalu og skal sostatt heldur ikki nøkur avtalað undirskrivast um yvirtøku av loftrúminum, fyrrenn málið er væl og virðiliga lýst og útgreinað við fyrimunum og vansum, kostnaðum og inntøkum, krøvum til okkara osfr. og hareftir hevur verið politiskt viðgjørt í samgonguni.

Sambandsflokkurin yvirtekur ikki bara fyri at yvirtakað ella fyri at kunna siga ,at nú er onki eftir av yvirtøkum undir vinnumálaráðnum.

Vit yvirtakað um tað er forsvarligt, skilagott og umsitingarliga møguligt og til menning og fyrimuns fyri land og fólk okkara.

**Vágur 18.07.2007**

# Til Ólav Petersen

Vilja tygum vinaligast undirbyggja tygara pástand um, at baptistar læra at arvasyndin er ikki til !?!

**Vinarliga, Óli Nicodemussen (oli-nic.com)**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13$^{30}$


**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**

Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.